# Kaj Leo Johannesen = Bryggjuleyva Jógvanssonur

HERGEIR STAKSBERG



Hey, allir máltalibanar í Føroyum. Vælkomnir til táttin, har vit saman skulu útreinsa øll fremmandljóðandi fólkanøvn í landinum. Men ikki bara tað. Vit skulu eisini finna nýggj føroysk nøvn í staðin fyri hesa mentanarspilluna, ið hevur gjørt um seg í alt ov langa tíð.

Niðanfyri verða ymisk kend nøvn tikin til viðgerðar, við vónini um, at ein endi fæst á hesum fremmanda íblástrinum, sum hevur eittans endamál: at gera av við okkara samleika!.

Hetta er skrivað í vónini um at navnalóggávan verður dagførd og vinnur frama millum okkara háttvirda fólk, so vit einaferð við Allah sleppa undan hesi útlendsku óhúmskuni.

Vinjard Johanesen => Víngarður Jógvanssonur
Aksel Vilhelmsson Johannesen => Ásur Viljarhjálmarssonur Jógvanssonur
Niels Midjord => Miðgarðs Niklas
Sommer Winther => Javndøgur
Jørgen Niclasen=> Jørundur Nikláassonur
Rosa Samuelsen => Rósa Sámalsdóttir
Kitty May Ellefsen => Ketta Eilifsdóttir í Fimta Mánaði
Petur Mohr Dam => Klettur Mamma Hyl
Rigmor Dam => Ríkmóður Hyl
Edmund Joensen => Átmuður Jóansson
Alfred Olsen => Alheims Fretur Sonur Olúmpisku leikirnar ella Alheimsfriður, sonur Olúmpiskra Leikanna
Hergeir Nielsen => Herspjót Nilsson
Kári P. Højgaard => Velji P. Hágarð
Dan Klein => Lítli Dann
Andreas S. Petersen => Dunnureas S. Petursson
Rodmund Nielsen => Stangarkjaftur Njálsson
Helena Dam á Neystabø => Vana Hyl á Neystabø
Eli Sørensen => Ravmagni Sjóreinsan
Lassi Klein => Lítli Fram
Andras samuelsen => Dunnureyv Sámalsson
Atli Dam => Havi hug til Hyl
Victor Danielsen => Sigur Dánjalsson
Bill Jusinusen => Rokning Jústinusarsonur
Kaj Leo Johannesen => Bryggjuleyva Jógvanssonur

Nú hesar rættingar eru almannakunngjørdar, so vóni eg, og onnur við, at fólkini, ið eru nevnd og enn eru her á foldum, hava so frætt av virðing fyri tí føroyska málinum, føroysku mentanini og føroyska samleikanum, at tey broyta navn sítt til ta rættaðu útgávuna.

Lesarabrævið er eitt beinleiðis plagiat einum tráði á kjak.org, ið hevði uppiborið at deilast við almenningin.

# Gerhard Lognberg hartar Javnaðarflokkin

HEÐIN D. POULSEN



Nú skal eg ikki blanda meg í óskilið í Javnaðarflokkinum, men eg kann ikki lata vera við at gera eina viðmerking til Gerhard og hansara sjálvhátíðarligu grein í bløðunum, har øll uttan hann sjálvur fáa skuldina.

Gerhard Lognberg gevur sínum egna flokki turt uppá og sigur seg skilja, at veljarar í hópatali venda flokkinum bakið. Eg skilji væl frustratiónirnar hjá Gerhardi, og eri samdur við Gerhardi í fleiri av hansara atfinningum ímóti Javnaðarflokkinum. Eitt, sum Gerhard tó fullkomiliga gloymir at nevna, er hansara egna leiklut. Tað eigur at undra fleiri, at Gerhard finst so hvassliga at leiðsluni í Javnaðarflokkinum, tá man skuldi trúð, at hann sum næst valdið tingmaður hjá Javnaðarflokkinum hevði so mikið av ávirkan í flokkinum, at hann var partur av hesi somu leiðslu, sum hann finst so harðliga at. Kanska hevur Gerhard start seg blindan upp á flísurnar hjá næstanum og gloymt bjálkan í egnum eyga.

Gerhard hevur jabbað um ein tunnil til Sandoynna í fleiri ár, og sær tað ikki út til, at hetta valagnið spillist. Gerhard og flest øll onnur vita, at tunnilin til Sandoynna verður ikki gjørdur tey næstu mongu árini og serliga ikki nú, tá pengarnar, við vælsignilsi frá Gerhardi, skulu brúkast til tunnlar aðrastaðni í landinum. Hevði Gerhard fokuserað upp á annað enn fantasi og deyðadómsprofeti, so hevði Sandoyggin kunnað blóma og kanska Javnaðarflokkurin við.

# Latið útlærd røktarstarvsfólk sleppa framat

JÓHANNA KØTLUM, FORKVINNA

Vegna Almanna- og Heilsurøktarafelagið



Almanna- og Heilsurøktarafelagið hevur varnast, at ófaklærd starvsfólk í alsamt størri mun fáa fast starv á sambýlum og røktarheimum, soleiðis at tey sum hava lokið sær eina útbúgving innan økið, ikki sleppa framat.

Eisini hevur felagið varnast, at tá limir felagsins eru settir við niðursettum brøki, við tí fyri eyga at fáa tímalønt arbeiðið aftrat, er fleiri ferðir komið fyri, at ófaklærd vera biðin um at taka vaktir, sjálvt um heilsurøktarar og onnur útlærd røktarstarvsfólk innan øki ynskja at taka vaktirnar.

Omanfyri nevndu viðurskifti metir Almanna- og Heilsurøktarafelagið vera í stríð við setanarpolitikkin sum er partur av starvsfólkapolitikkinum hjá landsstýrinum. Endamálið við setanarpolitikkinum er at tryggja, at almennur stovnur setir umsøkjarar, ið, úr einum heildarsjónarmiðið, er best egnaður til starvið.

Í Føroyum eru tríggjar dygdargóðar útbúgvingar innan røkt og innan tað at vera um veik og sjúk menniskju, nevniliga heilsuhjálparar, heilsurøktarar og sjúkrarøktarfrøðingar.

Rákið í samfelagnum í dag er útbúgving, vitan og menning.

Hetta rák samanhildið við starvsfólkapolitikkin hjá landinum og teimum dygdargóðu útbúgvingunum, sum eru á økinum í Føroyum í dag, ger, at Almanna- og Heilsurøktarafelagið ikki kann góðtaka, at ófaklærd verða sett í føst størv á sambýlum og røktarheimum, soleiðis at limir felagsins við eini viðkomandi útbúgving fyri starvið ikki sleppa framat og í staðin verða noydd til at fáa sær starv á økjum, sum einki hevur við útbúgving teirra at gera ella ikki sleppa upp í brøki, tí ófaklærd starvsfólk eru sett í viðkomandi brøki.

Felagið ásannar tó, at fleiri ófaklærd og dugnalig fólk sum nú er, eru í starvi og gera sítt arbeiði til lítar. Flestu av hesum fólkum hava sera góðan hug og hegni at vera um eldri og óhjálpin fólk, og felagið ásannar, at tað sanniliga hevur verið brúk fyri teirra arbeiðsmegi. Felagið metir tó, at tíðin nú er komin hjá samfelagnum sum heild at prioritera útbúgving og tænastu hægri enn higartil, soleiðis at førleikin og fakligheitin sum vit hava her á landið, verður nýtt til fulnar, og at tænastan, sum samfelagið veitir borgarunum verður á einum høgum støðið.

Hetta verður eftir felagsins tykki gjørt við at seta útbúgvið fólk í starv í mest møguligan mun.

At fáa ófaklærd úr teimum størvum, tey í løtuni sita í, er ikki eitt endamál í sær sjálvum fyri felagið. At ófaklærd sita í starvi á sambýlum og røktarheimum í eitt avmarkað tíðarskeið, kann eftir felagsins tykki birta uppundir, at hesi starvsfólk fáa hug og áræði til at nema sær útbúgving sum heilsuhjálpari, heilsurøktari ella sjúkrarøktarfrøðingur.

Felagið fer tí at mæla til, at stovnsleiðslur framyvir í fyrsta umfari seta faklærd fólk í leys størv og um faklærd fólk ikki eru, sum søkja, at ófaklærd einans verða sett í avmarkaða tíð, t.d. hálvt ár í senn.

Dygdin av arbeiðinum, sum verður framt á sambýlum og røktarheimum, er av avgerandi týdningi eftir felagsins tykki. Tey gomlu, sum fara á stovn í dag, eru ofta sera illa fyri og skulu hava dugnalig fakfólk at vera um seg.

Hetta metir felagið best verður tryggjað við at starvsfólk sum hava verið undir útbúgving, sum leggur áherðslu á, hvønn tørv eldri og óhjálpin fólk hava, verða sett at røkta og vera um hesi eldru fólkini.

Slíka útbúgving hava einans heilsuhjálparar, heilsurøktarar og sjúkrarøktarfrøðingar, umframt fólk við teimum gomlu útbúgvingunum sjúkrahjálparar, pleygarar og røktarheimsassistentar.

# Altjóða flogvøllur øllum føroyingum at gagni

ZAKARIAS WANG



Tá talað verður um ein altjóða flogvøll í Føroyum, hava vit lyndi til at gloyma, at ein slíkur fer at vera øllum føroyingum at gagni.

Eins og allar aðrar tjóðir hava vit brúk fyri samskifti við onnur. Hetta høvdu fólk eisini í steinøldini, og frá fyrsta degi, forfedrar okkara settu seg niður her, hevur fortreytin fyri at liva her verið, at tað bar til at flyta inn vørur, sum vóru neyðugar til lívsins uppihald, og fyri at gjalda tær, máttu vit flyta út nakað av tí, sum vit kundu framleiða. Til henda flutning vórðu fyrst stórir bátar nýttir. Síðan komu skip við dekki og nógvum seglum, og nú kundu nakrir fáir menn føra stóran farm millum lond. Hetta gav fleiri fólkum lívsmøguleikar her á landi. So hvørt samskiftistólini eru batnaði, eru okkara kor vorðin lættari, og tað hevur ongantíð verið so skilligt sum í dag, har vit kunnu samskifta við allan heimin við okkara teldum.

Men hví kann ein altjóða flogvøllur gera nakran mun?

Ein slíkur flogvøllur er millum 2 og 3 kilometrar langur, og tað vil siga, at flogfør av øllum sløgum kunnu seta seg niður á honum. Við teimum nýggju tølum, sum nú eru framkomin, ber til at vaksa munandi um møguleikarnar hjá flogførum at seta seg niður og koma upp aftur í mjørka og myrkri. Váðin av at senda flogfør til Føroya verður tí minni, og prísirnir fyri at nýta flogleiðirnar fer at minka. Vit fáa tí lægri flutningsprísir so hvørt sum flogferðslan verður meir álitandi.

Hetta koma øll tey, sum kundu hugsað sær at fingið eitthvørt virki sett á stovn í Føroyum, at fáa fyrimun av, eins og verandi virki gerast betri kappingarfør.

Hetta er galdandi fyri allar Føroyar uttan mun til hvar ið flogvøllurin er. Sjálvt um flogvøllurin ikki verður í Suðurstreymoy, fara virkismøguleikarnir í hesum parti av landinum at batna av tí at vit fáa flogvøllin. Sama er galdandi fyri bygdirnar í Suðuroynni, Norðuroyggjum, Sandoynni, Eysturoynni og sjálvsagt eisini fyri tær í Vágoynni, sjálvt um altjóða flogvøllurin ikki verður í teirra grannalagi. Vit vera øll vinnarar av at taka ta røttu avgerðina.

Tað, sum um ræður, er at taka stigið og fara undir at gera flogvøllin.

Men hava vit ráð til tað?

Tá kostnaðurin verður settur upp, og alt verður tikið við, gerast upphæddirnar fyri bygging rættiliga stórar. Men tað er ein spurningur, um tað er neyðugt at gera alla íløguna beinanvegin. Tað er helst skilagott at gera ætlanina og jørðarbeiðið fyrst, tí tá stórar grótmongdir skulu flytast, verður kostnaðurin minni fyri hvørja eind, meir verður gjørt í einum. Men nógv annað kann bíða, um so er, at ráð ikki eru í fyrstu syftu. Er flogvøllurin komin, fara vit at fáa fyrimunirnar av honum og teir verða alstórir. Tí kunnu vit beinanvegin fáa gongd á okkara vinnulív og fleiri fólk at búsetast í landinum, og tá fer at liggja betri fyri at halda fram við útbyggingini, so hvørt tørvur verður á.